# Lærarastørv í Leirvíkar skúla

**Søkt verður eftir 1 lærara skúlaárið 2006/07.**

**Starvið er fulla tíð, og er vegna lærara i farloyvi.**

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans.
- Dugir at samstarva og er fyrikomandi
- Er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Vit vænta, at tú ert**
- Fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- Virkisfús/ur og hugað/ur fyri toymissamstarvi
- Í samstarvi við leiðsluna og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan.

**Harumframt skulu lærararnir hava førleika at undirvísa í onkrum av hesum lærugreinum:**
Støddfrøði, alisfrøði, kristni og søgu/samtíð.

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving og linjulestur í onkrari av nevndu lærugreinum.

Royndir í føroyska fólkaskúlanum.

Læraralesandi, sum taka prógv í summar kunnu eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokki 18.1-27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v., avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera fyrstalæraranum, Fríðfinni Johnsson, í hendi í seinasta lagi 23. juni 2006, kl. 18.00.

Áhugað kunnu venda sær til Leirvíkar skúla, tlf. 443234 ella 743234 og spyrja eftir Fríðfinni Johnsson.

NB Tey, sum fyrr í ár hava søkt starv í Leirvíkar skúla, kunnu boða frá, at tey eisini søkja hetta starvið. Teldupostur fj1308e9@skulin.fo

Leirvíkar skúli hevur komandi ár uml. 90 næmingar og 8 lærarar.
Skúlin er ikki árgangsbýttur í øllum árgangum.
Tú kanst lesa meir um skúlan á heimasíðuni www.skulin.fo/lei



## VW Caravelle 2.5 til sølu

Árg. 11. februar 2000, Fýrahjólstrektur, DIESEL,
10 persónar, Leðursetur, Navigatión (GPS), Klima autm.,
Oljufýring o.m.a. Í sera góðum standi

**Selist um hóskandi boð fæst**

**TEL 31 98 48 ella 54 51 09**

Sosialurin 341800

# Dagrøktarar
## til Leirvíkar kommunu

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir dagrøktarum, at byrja 7. august 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Vit ynskja at tú**
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- Ert álítandi og hevur góð samstrvsevni
- Ert tolin og vísir umsorgan
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar

Í dagrøktarskipanini starvast 8 dagrøktarar og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 40. Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnunum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktarnir við børnunum í fimleikarhøllini. Arbeiðstíðin er í millum 7.30 - 17.15. Lønin er sambært sáttmála við FA, 1/3 av hesum er skattafrítt.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 443251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøktarleiðara.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2006 kl. 12.00.

Vinarliga send umsókn tygara til

**Leirvíkar kommuna**
Dagrøktarskipanin
Postboks 42
520 Leirvík

# Kunngerð um rudding

Fuglafjarðar kommuna hevur sett sær fyri, at bilvrak, akfør, bingjur og lutir annars, sum uttan góðkenning frá kommununi rekast á almennum ella privatum økjum, skulu verða beind burtur og latin góðkendum móttakara.

Sambært § 1 í umhvørvislógini og § 1, stk. 4 í náttúrufriðingarlógini er ikki loyvt at lata órudd liggja og rekast á almennum ella privatum uttanduraøki, og í § 10 um burturkast stendur, at ikki er loyvt at lata ónýtilig akfør liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðrastaðni.

Í § 61 í ferðslulógini stendur, at løgreglan kann burturbeina ella selja skrásetingarskyldug akfør, sum standa á almennum vegi uttan nummarplátu.

Tey, sum eiga/hava frammanfyri nevndu akfør/lutir o.t. á almennum ella privatum øki, skulu beina hetta/hesar burtur skjótast gjørligt.

Verður hetta ikki gjørt innan 23. juni 2006, beinir kommunan tað burtur fyri eigarans rokning.

**Fuglafjarðar kommuna**
**og**
**Sýslumaðurin**

# Dagrøktari og avloysarar
## søkjast til dagrøktina í Nes kommunu

Dagrøktin í Nes kommunu søkir eftir dagrøktara og avloysarum at byrja 14. august 2006.

**Vit ynskja at tú:**
- hevur góðar umstøður at hava børn bæði inn og uttanfyri
- tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- ert álítandi og hevur góð samstarvsevni
- ert tolin og vísir umsorgan
- hevur hegni og áhuga í at menna børnini
- dugir at síggja møguleikar fram um forðingar.

Arbeiðstíðin er millum 7.30-17.15. Lønin er millum FA og FKA.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 448462 ella 565020 og tosa við Katrin Poulsen dagrøktarleiðara.

Skrivlig umsókn skal vera dagrøktini í Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 19. juni 2006 kl. 12.00.

**Nes Kommuna**

# ÍDNAÐARØKIÐ
## á Hjalla til sølu



Við hesum verður ídnaðarøkið matr.nr. 1 od, Hoyvík, lýst til sølu. Økið er planerað og byggibúgvið, 8.112 m² til støddar.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til:

**Advokatfirma Anfinn V. Hansen**
Bryggjubakki 22 · Postsmoga 106
FO-110 Tórshavn · Tel 359595 · Fax 359596
advokat@advokat.fo

# Sethús til sølu

Sethús í Toftum í Vági til sølu, til støddar ca. 8,5x7 m. Matr. nr. 219, grundøkið til víddar 710 m².

Húsini eru í 2 hæddum + kjallara.

**Tlf. 373081, 373062 ella 223462**
**eftir kl. 17.00**